## DAGSINS MEINING

# Saklig Orðaskifti

Orðaskiftið um PISA kanningarúrslitini hevur higartil verið bæði sakligt, gevandi og mennandi. Hetta er gott og positivt, og nú ræður um at halda orðaskiftinum á hesum støði. Tað, sum okkum tørvar, er júst eitt sakligt og uppbyggjandi orðaskifti, har vit opið og ærliga viðgera tey mistøk, ið eru gjørd og koma við góðum hugskotum til batar. Í fyrstu oddagrein okkara um PISA vístu vit á, í hesum máli eru fleiri aktørar: lands- og kommunalir myndugleikar, lærarar, foreldur o.a. Tað eru eisini júst umboð fyri hesar aktørar, ið seinastu dagarnar hava stigið fram á almenna pallin við positivum atfinningum og við góðum hugskotum.

Vit vita longu nú um nógvar av teimum trupulleikum og um nógv av teimum viðurskiftum, ið elva til vánaligu støðuna í fólkaskúlanum. Ein tann størsti trupulleikin er t.d. ófriður og órógv. Hetta stendst ikki bara av, at lærarar ikki megna at gera undirvísingina spennandi og viðkomandi. Hetta hevur nakað at gera við, at skúlalóg og lesiætlanir ikki seta nóg stór krøv til næmingarnar, at tilfar er ikki tókt. Men hetta óskil hevur eisini sín uppruna í heimunum, har børnunum heldur ikki verða sett krøv. Børnum mugu setast mørk úti sum heima. Sostatt eru í bert hesum eina dømi fleiri um ábyrgdina. Sama kann vera sagt um aðrar trupulleikar so sum heimaarbeiði, uppmøting og krøv um fakligar førleikar.

Nú er at fara til verka og gera nakað við teir trupulleikar, sum vit uttan víðari kenna. Teir kunnu so at siga verða rættaðir her og nú t.v.s við hóskandi broytingum í fólkaskúlalógini fyrst í komandi tingsetu. Her eigur ikki at verða drálað! Vit hava nú skilt, at umfatandi broytingar longu eru á veg í læraraútbúgvingini, og hetta er sera gott og vísir hetta, at avvarðandi myndugleikar hava sýnt vilja til at bøta um støðuna. Latið okkum fáa hesa broytingar á borðið, so vit fáa ein uppdateraðan læraraskúla. Grannalond okkara hava longt um læraraútbúgvingina, og tað eiga vit eisini at gera. Hetta, at Danmark ikki fremur slíkar broytingar, eigur ikki at halda okkum aftur. Tað hevur verið róð uppundir, at vit skulu lata útlendskar serfrøðingar kanna allan skúlaskapin. Tað kann vera gott og væl, men vit hava fyri tað fyrsta ikki tíð at bíða eftir slíkum kanningum – fyri tað annað kenna vit flestu trupulleikarnar og fyri tað triðja áttu slíkar kanninghar fyri alt tað at verið gjørdar fyri árum síðan. Hartil kemur, at vit við PISA hava eina altjóða kanning, so er at nýta hana. Verður sæð burtur frá teimum baklóku, sum undir slíkum umstøðum vanliga stíga fram og við hevjaðum fremstafingrum og við ikki sørt av skaðafrøði gera sær dælt av hesi syndarligu støðu, so hevur kjakið verið gott, mennandi og skuldi givið øllum avvarðandi góðan íblástur at fara til verka.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Pensionistar og barnafamiljur



BILL JUSTINUSSEN
løgtingsmaður fyri Miðflokkin

Nú hevur løgmaður biðið landsstýrismenn um at kanna, hvussu pensionistar og ungar barnafamiljur onkursvegna kunnu fáa ein lætta yvir landskassan. Hetta er ein skilagóð avgerð, hóast løgmaður er rættiliga seinur á veg. Høgir oljuprísir og truplar umstøður hjá fleiri samfelagsbólkum eru ikki nýggj fyribrigdi. Tí legði Miðflokkurin í farnu tingsetu ítøkilig uppskot fyri Løgtingið, sum júst vóru ætlað at lætta um hjá bæði pensionistum og ungum barnafamiljum.

### Oljuavgjaldið

Eitt uppskot, sum Miðflokkurin saman við Sjálvsstýrisflokkinum legði fyri tingið, var at minka um oljuavgjaldið. Hetta er nú so høgt, at landskassans meirinntøkur av mvg munnu skjótt fara at vera eins stórar og alt oljuavgjaldið. Vit kunnu staðfesta, at landskassin fær meiri inntøkur, enn roknað varð við, tá fíggjarlógin varð samtykt, og tí átti at verið rúm fyri hesum lættanum uttan aðra meirjáttan á fíggjarlógini. Men tíverri eru føroyskir samgongupolitikkarar ikki enn búnir at viðgera mál, sum andstøðan leggur fram, hóast hesi eru fult í tráð við samgonguskjal og vanliga fólkahugsan. Uppskotið fekk bert undirtøku frá 4 tingmonnum, Kári P. Højgaard, Marjus Dam, Jenis av Rana og Bill Justinussen. Undanførslan hjá samgonguni og Tjóðveldisflokkinum var sum ikki eina ferð, at í staðin fyri at lækka oljuavgjaldið, kunnu vit heldur hækka barnafrádráttin. Ein kann spyrja, hvussu skilagott tað er at hækka barnafrádráttin til pensionistar, tí tað munnu vera heilt fáir - um nakar - pensionistur, sum eigur børn undir 18 ár. Men hetta metti so tann altvaldandi fíggjarnevndin undantikið Kári P. Højgaard. Eg havi uttanfyri politiska umhvørvið ongum føroyingi møtt, sum ikki heldur tað vera rætt at avtaka oljuavgjaldið. Nú løgmaður hevur biðið landsstýrismenn finna fram til onkrar lættar fyri nevndu samfelagsbólkar, mátti tað verið eitt gylt høvi hjá honum at gjørt nakað við oljuavgjaldið. Ein løtt og skjót loysn, sum samstundis vildi minkað um umsitingarútreiðslur. Ger landsstýrið tað ikki, fer Miðflokkurin enn eina ferð at royna uppskotið í Løgtinginum.

### Stórfamiljubilar

Eitt annað uppskot, sum Miðflokkurin legði fram, var at minka avgjaldið á bilum til fleiri enn 5 persónar. Hetta uppskotið fekk góða móttøku víða um, men ikki í Løgtinginum. Aftur hesaferð helt fíggjarnevndin, at best man vera at hækka barnafrádráttin. Ein løgin niðurstøða hjá fíggjarnevndini, tí hetta uppskotið legði júst upp til at rudda burtur ójavnar, sum eru millum tey, sum hava færri enn 4 børn og tey, sum hava 4 børn ella fleiri. Við at hækka barnafrádráttin hjá øllum, vildi hesin ójavnin framvegis verið eins stórur, og so var onki vunnið hesum trupulleikanum viðvíkjandi. Her er eisini ein møguleiki hjá landsstýrinum at fremja ítøkiligar batar. Vónandi eru landsstýrismenn so mikið at sær komnir, at teir ikki kveistra andstøðuuppskot so langt burtur, at tey ikki kunnu síggja dagsins ljós í onkrum øðrum formi.

### Vaksandi barnafrádráttur

Undir øllum umstøðum ber til hjá landsstýrinum at hækka barnafrádráttin munandi. Hetta kann gerast á ymsan hátt. Ein máti er at gera barnafrádráttin vaksandi fyri hvørt barnið, sum kemur afturat. Hendan skipan er galdandi aðrastaðni, og hugsanin er helst at økja um føðitíttleikan, sum er ein kendur trupulleiki um alla Europu.

### Familjupolitikkur

Skjótt er at staðfesta, at tað ikki eru tey stóru nýbrotini, hendan samgongan hevur framt á familjupolitiska økinum. Tí fer Miðflokkurin í komandi tingsetu at leggja eina røð av familjupolitiskum uppskotum fyri Løgtingið samstundis sum vit fara at viðgera landsstýrisins uppskot við allari vælvild, um hesi eru skilagóð. Samanlagt eru vónir fyri, at bæði pensionistar og ungar barnafamiljur endiliga fara at fáa onkrar batar, sum muna í gerandisdegnum.

# Strandferðslan snýtti kjarnukundarnar



BJARTI THOMSEN
Nólsoy

Strandfaraskipini fluttu fólk ókeypis nakrar dagar. Eisini hevði Strandferðslan tilboð, har mánaðarkort kundi keypast fyri hálvan prís. Teir trúgvastu kundarnir hjá strandferðsluni, teir sum frammanundan høvdu keypt mánaðarkort, vóru tó við skerdan lut og fingu ikki hesar sømdir. Hetta er ein undarligur framferðarháttur hjá Strandferðsluni.

Eg heitti á Strandferðsluna um at rætta mistakið, men teir vóru hvørki at høgga ella stinga í.

Strandferðslan heldur seg hava havt útsølu, sum einhvør annar handil, og á útsølu eru ikki øll sum gera sama kvetti. Teir siga, at ikki er vanligt at fáa pengar aftur, hóast ein hevur keypt eina vøru dýrari enn á útsølu stutt eftir. Eg veit tó um konu í Klaksvík, sum ein fríggjadag keypti sær dýran kjóla. Mánadagin eftir fóru somu kjólar fyri hálvan prís á útsølu. Hesin handilin var so mikið at sær komin, at hann bjóðaði konuni helmingin av peninginum aftur.

Strandferðslan kann ikki skáka sær undan og kalla teirra tiltak fyri útsølu. Hugsa tær, at ein handil hevur trúgvar kundar við onkrum slagi av limakorti og teir fáa at vita, at handilin nú hevur útsølu, men av tí at teir hava limakort, sleppa teir ikki at luttaka í útsøluni. Hesin handilin hevði fingið harðan dóm frá sínum trúgvu kundum. Strandferðslan hevur monopolstøðu og eigur at veita somu tænastu til allar sínar kundar.

Framferðin hjá Strandferðsluni var klossut í aðrar mátar eisini. Heldur enn at krevja hálvt gjald umborð á skipunum, bleiv fult gjald kravt og so mátti innkrevjarin fáa kontonr frá kundunum, so helmingurin kundi flytast aftur. Vorið sum rationel framferð.

Helst eru fleiri meiningar um tiltakið hjá Strandferðsluni, men at teir loyva sær ikki at geva øllum kundum somu sømdir, eigur ikki at verða góðtikið. Eftir stendur í hvussu er, at eg føli meg snýttan av Strandferðsluni.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.